## Leikritakapping

**Innbjóðing**
Leikpallur Føroya lýsir við hesum til kapping um leikrit til nýggjan føroyskan sjónleik.

**Endamál**
Okkara tíð nú um stóra aldaskiftið er full av avbjóðingum og nýggjum møguleikum. Saknur er á føroyskum leikum, ið lýsa hesa fjølbroyttu og skiftandi tíðina, ella sum úr søgu og fortíð taka upp evni, ið hava týdning fyri okkum enn í dag. Endamálið við kappingini er at menna sjónleikin í Føroyum og fáa fram nýskrivað leikrit, hugtakandi, hugvekjandi og hóskandi til nútímans framførslur á føroyskum palli.

**Treytir**
Evnið er frítt, somuleiðis skipanin av evninum, men dentur verður lagdur á søgugongd, persónslýsingar og myndandi hugflog í leikinum. Longdin á leikinum eigur at vera á leið sum í vanligum sjónleikaframførslum. Leikritið skal ikki hava verið framført ella almannakunngjørt áður.

**Virðisløn**
Ein virðisløn á **100.000,- kr.** verður latin. Dómsnevndin hevur rætt til ikki at lata virðislønina, heldur hon tey innkomnu leikritini ikki vera virðislønarverd.

**Dómsnevnd**
Til at viðgera tey innsendu leikritini er dómsnevnd sett. Í nevndini eru Vár Jacobsen, dramaturgur, Olaf Johannessen, sjónleikari, og Helga Hjørvar, sjónleikari.

**Innlating**
Leikritini skulu latast inn dulnevnd við frámerki. Saman við leikritinum skal latast inn afturlatin brævbjálvi við sama frámerki uttan og við navnaseðli í, sum sigur, hvør ella hvørji, ið hava gjørt leikritið. Leikritini skulu vera latin inn í seinasta lagi 15. august 2000 og sendast Leikpalli Føroya.

**Leikpallur Føroya,**
Undir Pisuvarða 2,
postsmoga 212, 110 Tórshavn



VINNUHÚSIÐ
House of Industry

## Skeið í starvsfólkarætti
### – galdandi á privata arbeiðsmarknaðinum

Føroya Arbeiðsgevarafelag (FAG) skipar tann 25. og 26. mai 2000 fyri skeiði í starvsfólkarætti.

**Endamál**
Endamálið við skeiðnum er at geva leiðarum og starvsfólkum, sum fáast við hesi viðurskifti, yvirlit yvir galdandi lógir og reglur á økinum og gjøgnumganga ávís evnir.

**Á skránni er m.a.:**
- Arbeiðstíð, døgndrift og skiftisvaktir
- Løn, viðbøtur, yvirtíð, starvsaldur
- Frítíð og frítíðarløn
- Barnsburðarfarloyvið, sjúka
- Setan, uppsøgn og burturvísing

**Grundarlagið fyri skeiðnum er:**
- Lønarsáttmáli millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag
- Sáttmáli millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og S&K/Føroya Arbeiðarafelag
- Starvsmannalógin, frítíðarlógin, løgtingslóg um fráveru vegna barnsburð v.m.

**Undirvísing**
Skeiðið verður í høvuðsheitum skipað sum undirvísing og kjak, tó verður bólkaarbeiðið eisini á skránni.

**Undirvísarar**
Kristoffur Lakså, næstformaður í FAG og Bjørgfríð Ludvig.

**Praktisk viðurskifti**
Skeiðið verður á Hotel Hafnia. Kostnaður er kr. 3.300,- fyri hvønn. Íroknað í prísinum er matur og skeiðtilfar.

Tekning fer fram hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag á tlf. 311864 ella á telduposti: fag@industry.fo í seinasta lagi 11. mai 2000 kl. 12.00.



NORÐURLANDAHÚSIÐ

## Fyriskipanardagur í Norðurlandahúsinum
### - Børn og Ung

**Leygardagin 6. mai 2000 kl. 14.00**

Norðurlandahúsið stuðlað av, Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, skipar leygardagin 6. mai ein fyriskipanardag í Norðurlandahúsinum, fyri einstaklingum, feløgum, skúlum v.m., ið á ein ella annan hátt starvast innan mentunarøkið, "Børn og Ung". Endamálið við fyriskipanardegnum er m.a. at,

- savna fólk saman, ið arbeiða innan barna- og ungdómsøki
- skráseta fólk og felagsskapir, við endamáli og kontaktpersóni
- kunna um almennan lýsingamøguleika av tiltøkum
- hoyra um ynskir og tørv fyriskiparar av barna- og ungdómstiltøkum hava til skipanir

**Skrá**

Kl. 14.00 Joachim Clausen, formaður í Nordisk Ungdomskomité greiðir frá nevndararbeiðinum, og høvi verður at seta spurningar

Kl. 14.20 Páll Danielsen kunnar um Styrgruppen för nordisk barn- och ungdomskultur.

Kl. 14.30 Umboð fyri Undirvísingar- og Mentamálastýrið kunnar um mentunararbeiðið, stuðulsskipanir og -møguleikar.

Kl. 14.45 Jákup av Skarði kunnar um arbeiði hjá Føroya Ungdómsráð

Kl. 15.00 Laufey H. Blaasvær kunnar um norðurlendsku kunningartænastuna og um internet hendingaskipanina www.kunning.fo

Kaffisteðgur

Kl. 15.15 Kjak um barna- og ungdómspolitikk í Føroyum

Tiltakið er alment og ókeypis.

Luttøka kann fráboðast um teldupost til: laufey@nlh.fo



## Til sølu

1 stk. brúkt dekkmaskina og
1 stk. brúkt avbalanseringsmaskina

bíliga til sølu

Bilfríðkan
Velbastaðvegur • 110-Tórshavn
Tel. 31 73 00 - 21 73 00
FIAT
Sosialurin - 311820



## Til sølu

| | Árg. |
|---|---|
| BMW 316I | 1995 |
| BMW 318TDS diesel | 1996 |
| PEUGEOT 406 SL | 1996 |
| RENAULT LAGUNA RT 2,0 | 1996 |
| FIAT MAREA 1,6 | 1997 |
| FORD SCORPIO 2,8 | 1986 |
| FORD ESCORT aut. gear | 1984 |
| FORD SIERRA 1,6 v/skaða | 1984 |

Lagalig fígging.

Bilfríðkan
Velbastaðvegur • 110-Tórshavn
Tel. 31 73 00 - 21 73 00
FIAT
Sosialurin - 311820



DANNY TRANSPORT
- tá okkurt skal koyrast ella goymast
Tlf. 319192


Lýsið í sosialinum

# Yngd

Nr. 16 2000 SOSIALURIN

s. 16-17

## Nýttu páskafrítíðina at granska Bíbliuna



síða 15

## Potturin er komin upp á kók





síða 18
Roskilde Festival 2000

síða 19
Hitlistar og svara so!

baksíðan
Fløguumæli